Álit

í

løgtingsmáli nr. 95/2022: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um afturbering av útreiðslum til filmsframleiðslu í Føroyum (Broyttur fíggingarleistur og lógartøkniligar rættingar)

Høgni Hoydal, landsstýrismaður í uttanríkis- og vinnumálum, hevur lagt málið fram tann 28. mars 2023 og eftir 1. viðgerð tann 30. mars 2023 er tað beint Vinnunevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 31. mars, 19., 21. og 26. apríl og 4. mai 2023.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við umboð fyri Filmshúsið, Visit Faroe Islands og landsstýrismannin í uttanríkis- og vinnumálum, Høgna Hoydal.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Erhard Joensen, Eyðdis Hartmann Niclasen, Annika Olsen, Uni Holm Johannesen og Karlot Hergeirsson) hevur hesar viðmerkingar:

Føroysk filmsvinna og filmsframleiðsla standa á einum vegamóti. Seinastu árini eru gjørdar fleiri smærri og størri verkætlanir, sum veruliga hava sett Føroyar á heimskortið í filmshøpi. Ongin ivi er heldur um, at filmur og sendingar, sum eru upptikin í Føroyum, hava stóran týdning fyri okkum sum ferðamannaland, og tær vinnur, sum beinleiðis eru tongdar at ferðavinnuni.

Hetta er hent, sjálvt um vit ikki hava havt munagóðar upphæddir á fíggjarlógini, hvørki í Filmsgrunninum ella í okkara afturberingarskipan.

Meirilutin metir, at hetta ikki er haldbært í longdini. Um vit veruliga vilja hava eina filmsvinnu í Føroyum, so mugu fíggjarligu karmarnir betrast munandi og í minsta lagi verða kappingarførir við okkara kappingarneytar.

Kappingin um, hvar framleiðslufeløg velja at staðseta sínar framleiðslur er sera hørð, og tað er ongin ivi um, at framleiðslufeløgini serliga hyggja eftir, hvør stuðulsskipan er galdandi í landinum, áðrenn tey velja endaliga staðseting.

Ein av okkara fremstu kappingarneytum í so máta er Ísland. Ísland hevur eina munandi betri afturberingarskipan enn okkara, har allar verkætlanir eru tryggjaðar eina afturbering upp á 25% av kostnaðunum sum eru hildnir í Íslandi. Eisini hevur Ísland eina víðkaða skipan, har 35% verða afturborin, um serstakar treytir eru loknar.

Uppskotið leggur upp til, at landsstýrismanninum verður heimilað at áseta reglur um, at fakfólk og førleikar í Føroyum skulu brúkast í framleiðsluni. Meirilutin heldur, at hetta er týdningarmikið at fáa gjørt beinanvegin, soleiðis at lógarbroytingin førir við sær eina førleikamenning av føroyskum áhugamálum í størst møguligan mun.

Landsstýrismaðurin hevur upplýst fyri nevndini, at ætlanin er at koma við eini broyting til lógina í heyst. Galdandi lóggáva sigur, at hvør verkætlan skal leggjast í eitt sjálvstøðugt partafelag. Mett verður, at hetta er ein óneyðuga tung skipan, og tí er ætlanin at strika hesa treytina í lógini.

Nevndin metir, at gott hevði verið við eini árligari frágreiðing um virksemi, sum er fevnt av lógini, fyri leypandi at eftirmeta virknaðin av skipanini. Nevndin heitir tí á landsstýrismannin um at hugsa hetta inn í broytingina, sum ætlanin er at koma við í heyst.

Harumframt hava Annika Olsen, Uni Holm Johannesen og Karlot Hergeirsson hesar viðmerkingar:

Tað er kostnaðartungt at framleiða film, og tað er neyðugt við almennum skipanum, ið kunnu stuðla føroyskari filmsframleiðslu. Í Norðurlondum og aðrastaðni hava tey eisini ásannað tað fyri langari tíð síðan. Føroyar eru í harðari kapping við onnur lond um filmsverkætlanir, og tískil er umráðandi, at tað í Føroyum eru somu skipanir sum í grannalondunum.

Uppskotið um filmsafturbering er eitt stórt framstig fyri føroyska filmsvinnu. Filmsafturberingin fer at gera tað lættari hjá filmsframleiðarum at fáa pengar til vegar at gera film í Føroyum, og ikki sum nú, har tað er neyðugt hjá stigtakarum at fara ígjøgnum eina tunga politiska tilgongd við fíggjarheimild á fíggjarlógini ella við eykajáttan. Er talan um eina áhugaverda filmsverkætlan, kann landið stuðla við 25% av eini filmsverkætlan; tó kann upphæddin í mesta lagi vera 5 mió. kr. av einari samlaðari verkætlan. Er talan um eina størri upphædd enn tær 5 mió. kr., so er møguleikin at fáa eyka fígging á fíggjarlógini.

Í 2016 orðaði landsstýrið ein politikk fyri skapandi vinnur í Føroyum, og árið eftir varð Filmshúsið stovnað. Filmshúsið hevur hesi árini megnað at styrkt filmsumhvørvið og ment filmsgerð, filmsmentan og filmsvinnu í Føroyum, samstundis sum góð sambond eru knýtt við filmsframleiðarar úti í heimi. Úrslitini hava verið avbera góð. Í Føroyum eru vit í holt við at menna eitt føroyskt filmsmál og skapa filmssøgur í føroyskum umhvørvi við føroyskum innihaldi, samstundis sum fleiri dømi eru um, at føroysk fakfólk og føroysk náttúra eiga serligan lut í stórum útlendskum filmsverkætlanum.

Í fíggjarlógini, sum varð samtykt í vár, var játtanin til Filmshúsið hækkað, og hetta uppskotið um filmsafturbering skal geva filmsvinnuni tryggari karmar at virka undir. Tað er umráðandi, tí verður rætt atborið, kann filmsvinnan gerast eitt nýtt týðandi vinnubein í Føroyum, sum verður við til at fjøltátta samfelagsbúskapin.
Nógv avleitt virksemi stendst av filmsvinnuni. Filmsverkætlanum tørva víðfevndar tænastur sum gisting, umbygging, sniðgeving, útbúnað, flutning og mangt annað, og stóru filmsverkætlanirnar gera eisini Føroyar sjónligari sum ferðavinnuland. Afturberingin kemur sostatt landinum fleirfaldað aftur í øktum inntøkum.

Meirilutin tekur undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Minnilutin (Jørgen Niclasen og Árni Skaale) hevur hesar viðmerkingar:
Filmsvinnan er ein nýggj og spírandi vinna, sum í eksponeringsvirði er torfør at meta um týdningin av. Tó heldur minnilutin, at hendan vinnan hevur positiva ávirkan og kann vera við til at styrkja grundarlagið fyri Føroyum sum ferðavinnumál.
Eisini kann stuðul til filmsvinnuna vera við til at grundleggja hetta sum lønandi og vaksandi vinnu í Føroyum.

Tað er tí rætt at stuðla hesari vinnuni, til hon kann vera sjálvberandi. Men vit eiga at læra av teimun feilunum, vit hava gjørt í øðrum stuðulsskipanum. Slíkar skipanir eiga at eftirmetast við ávísum áramáli. Tí eigur ein sólseturáseting at vera í lógini, so Løgtingið tryggjar sær, at skipanin verður eftirmett.
Undir nevndarviðgerðini hava vit fingið at vita, at "letter of intent" ofta skal latast filmsframleiðara upp í fleiri ár, áðrenn ein filmsverkætlan gerst veruleiki. Hesum eiga vit at taka hædd fyri, tá vit gera eina sólseturáseting.
Hendan skipanin eigur tí at loyva, at tilsøgn um pening kann játtast næstu 5 árini, men skal verða útgoldin, áðrenn 8 ár eru gingin.

Vit mæla tí til, at greinin um ígildiskomu verður orðað soleiðis, at sólseturáseting verður sett inn, og at pengar kunnu verða játtaðir næstu fimm árini eftir hesi lóg og kunnu útgjaldast fram til 31. desember 2031.

Minnilutin setir fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

§ 2 verður orðað soleiðis:

"**§ 2.** *Stk. 1*. Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. oktober 2023, og fer úr gildi 1. oktober 2031.
Stk. 2. Tilsagnir um afturbering sambært hesi lóg kunnu játtast fram til 1. oktober 2028.
Stk. 3. Umsóknir, ið eru góðkendar at fáa afturbering eftir hesi lóg, kunnu fáa útgoldið peningin fram til 1. oktober 2031."

Serligar viðmerkingar
Ein sólseturáseting verður sett inn. Lógin fer úr gildi tann 1. oktober 2031. Heimilað verður at geva tilsagnir um afturbering í fimm ár, fram til tann 1. oktober 2028.
Tað kann koma fyri, at filmsframleiðarar lata umsóknir um afturbering upp í fleiri ár, áðrenn ein filmsverkætlan gerst veruleiki. Tískil er tað ásett í stk. 3, at peningur við eini játtaðari tilsøgn kann útgjaldast fram til 1. oktober 2031.

Við hesi broyting tekur minnilutin undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Vinnunevndin, 9. mai 2023

Erhard Joensen formaður	Annika Olsen næstformaður	Uni Holm Johannesen
Karlot Hergeirsson	Árni Skaale	Jørgen Niclasen

Eyðdis Hartmann Niclasen